# Yvirlýsing: Stuðlið innflutninginum av frystum fiski

Samtak og arbeiðarafeløgini heita á politiska myndugleikar um at kanna møguleikan fyri at stuðla innflutningi av frystum fiski, soleiðis at føroysku flakavirkini kunna kappast á jøvnum føti við kappingarneytar úr t.d. Noreg og Íslandi.

Seinastu 15 mánaðirnar er føroyska arbeiðsloysið vaksið við einum 1200 fólkum, soleiðis at tað í dag eru 1500 arbeiðsleys.

Arbeiðarafeløgini leggja dent á, hvussu týdningarmikið tað er at fáa skapað nøkur nýggj arbeiðspláss, soleiðis at Føroyar kunna arbeiða seg burturúr teirri kreppu, ið er uppstaðin.

- Vit síggja fyri hvønn mánað, hvussu okkara fólk missa arbeiði ella hava minnið at gera, og vit óttast, at henda gongd fer at halda fram eina rúma tíð afturat, um ikki vit handlað í stundini, siga formennirnir í arbeiðarafeløgunum.

Arbeiðarafeløgini hava seinastá árið lítið og einki merkt til, at nakað arbeiðsskapandi er gjørt - tvørturímóti so eru nógv arbeiðsfólki bæði hjá privatum, landi og kommunum søgd úr starvi ella hava minnið at gera. Eisini má havast í huga, at summar av stóru verkætlanunum, ið landið hevur sjósett, fara ikki at geva arbeiði fyrr enn í 2011.

Samtak og arbeiðarafeløgini vóna, at politiski myndugleikin fer at taka væl ímóti uppskoti Miðfloksins um at broyta løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi, og at skipanin kann setast í verk sum skjótast, soleiðis at privata vinnulívið fær møguleika at skapa eina rúgvu av størvum við jøvnum inntøkum.

Tað eru nógv ting, ið kundu verið gjørt fyri at fingið meir arbeiði í landið, men at veita stuðul til innflutning av frystum fiski er lutfalsliga einfalt, og til ber beinanvegin at síggja virknaðin av hesum. Sum eisini verður sagt í viðmerkingum til uppskotið, so duga vit at virka fisk, skipanin kostar lítið og einki og sambært framrokningum kann væntast at vinningurin fyri landið verður munandi hægri, enn stuðulin, ið latin verður.

Í løtuni eru umleið 1500 arbeiðsleys um allar Føroyar, og 80% av hesum eru ófaklærd.

**Samtak**
*Føroya Arbeiðarafelag*
*Havnar Arbeiðsmannafelag*
*Havnar Arbeiðskvinnufelag*
*Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag*
*Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag*

# Ætlar Høgni at fáa bilbukt við undirskotið við at strika inntøkur á eina milliard?

KAJ LEO JOHANNESEN



So komu framtíðarætlanirnar Høgna Hoydal, andstøðuleiðara. Ætlarnirnar eru at seta í verk nøkur av tilmælunum úr Visjón 2015, sum fyrra ABC samgongan tók stig til. Men ætlanin er eisini at niðurlaga inntøkur landsins við 1000 mió. kr. um árið – 2.7 mió. kr. minni um dagin at fíggja framtíðar vælferð. Tí er tað kanska ikki so undarligt, at fjølmiðlarnir ikki spyrja Høgna Hoydal um hendan táttin í politisku ætlanunum hjá honum. Tí tað er so veruleikafjart, at hann ikki kann takast fyri fult í hesum døgum.

**Blokkniðurskurður og skattalættar**

Blokkniðurskurðurin hjá Fullveldislandsstýrinum hevur higartil merkt 3.8 mia. kr. minni í inntøkum til landskassan, sambært útrokningum frá Fíggjarmálaráðnum. Tað var somuleiðis skeivt av Fullveldislandstýrinum einki at gera fyri at fáa meiri inntøkir ella skerja útreiðslurnar svarandi til niðurskurðin í 2002.

Tað hevur verið tosað um, hvørt tað var neyðugt at geva fólki størri realløn við skattalættunum, sum vóru settir í verk í árunum 1998 til 2008. Fyrra ABC-samgongan gav skattalættar, men samstundis varð inngjaldið til samhaldsfasta eftirlønargrunnin hækkað, og tí vóru skattalækking partvíst tikin innaftur fyri at styrkja um eina av okkara eftirlønarskipanum.

Vit politikkarar hava ábyrgd mótvegis borgarunum og samfelagnum. Men eg taki mær onga ábyrgd av at hava skorið inntøkusíðuna við 3.8 mia. kr. frá 2002. Eg helt tá og haldi tað enn, at tað var ein vanlukkulig avgerð fyri okkara búskap. Hinvegin taki eg fulla ábyrgd fyri at hava givið fólki størri fíggjarligt frælsi við skattalættunum síðani 2004. Og eg taki fulla ábyrgd at hava hækkað inngjøldini til samhaldsfasta eftirlønargrunnin og harvið givið pensjónistunum størri útgjald.

Eg átaki mær ábyrgdina at føra okkara samfelag úr búskaparkreppuni so trygt og snikkaðsleyst sum gjørligt. Men skulu vit skapa vøkstur í samfelagnum og tryggja okkara vælferð eru grundleggjandi broytingar neyðugar innan eitt nú vinnupolitikkin og almenna geiran. Tí er neyðugt við breiðum semjum, sum røkka longri enn eitt samgonguskeið. Eg rætti enn einaferð hondina út til Høgna Hoydal og bjóði til eitt breitt og gevandi samstarv okkara landi at gagni. Søguna kunnu vit ikki broyta – vit kunnu bert læra av henni. Men framtíðina eiga vit øll, um vit hava lív og heilsu.

**Fíggjarlógin 2010 og búskaparfrágreiðingin**

Almennu rakstrarútreiðslurnar eru vaksnar nógv seinastu nógvu árini og ein tílíkan vøkstur yvir longri áramál klárar neyvan nakað land í heiminum. Tí hevur samgongan sett sær fyri at fáa javnvág í almenna raksturin fyri at tryggja, at vit kunnu varðveita okkara vælferðarsamfelag.

Samgongan hevur framt fleiri fíggjarpolitiskar tillagingar m.a. verður rentustuðulin til sethúsalán niðurlagaður úr 40 prosentum í 35 prosent yvir 5 ár, og MVG-stuðulin til húsabygging verður tikin av yvir 3 ár. Harumframt er nýggja heilsutryggingin sett í verk, og pensjónsnýskipanin verður liðug í næstum. Vit komu tó ikki á mál við øllum teimum ætlaðu fíggjarpolitisku tiltøkunum í 2009. Skal málið um at fáa javnvág í almenna raksturin innan 3 til 5 ár røkast, mugu hesar tillagingar fremjast. Men lat meg gera tað heilt greitt. Ongar av teimum bygnaðarligu tillagingunum, sum landsstýrið arbeiðir við eru sleptar, og málið er, at tær koma í gildið á fíggjarlógini fyri 2011.

Búskaparráðið mælir til, at inntøkugrundarlagið verður breiðkað, at útreiðslurnar verða tálmaðar, og at fíggjarpolitisk tiltøk verða sett í verk, so javnvág fæst í almenna búskapin. Á fíggjarlógini fyri 2010 eru hesi tilmæli fylgd. Vit hava minkað útreiðsluvøksturin úr 7 prosentum niður í umleið 2 prosent, og vit hava breiðkað um inntøkugrundarlagið hjá landskassanum. Játtanin til íløgur er umleið 400 mió. kr., og játtanin er tann størsta nakrantíð, tá ið útbyggingin av flogvøllinum er tikin við.

## Rætting:

Í grein í blaðnum friggjadagin um prestaósemjuna í Hvalba skrivaðu vit, at Niclas Sigurheim er kirkjuráðsformaður í Hvalba. Tað er ikki rætt; Niclas Sigurheim er kirkjuráðsformaður í Sandvík.

Undirritaða biður orsaka mistakið

**Anna V. Ellingsgaard, journalistur**

# Hvat er endamálið við FF?

JAN HØJGAARD
formaður í Føroya Fiskimannafelag



Síggi at tveir av nevndarlimunum hava hug at fýlast á fíggjarstýringina í FF, at nevndarsamsýningarnar eru ov høgar, og at kostnaðurin til sakførara er farin upp. Harmiligt, at nevndarlimirnir ikki vilja taka hetta upp innanhýsis, soleiðis at vit kunna loysa málini á ein virðiligan hátt.

Eg hevði upprunaliga ikki ætlað at viðmerkt greinarnar, men tá ið eg nú havi fingið óteljandi áheitanir um hetta, so skal eg skriva nakrar útdýpandi reglur.

Viðvíkjandi spurningum um fundarpeningin, so er at siga, at samsýningarnar sjálvandi eru farnar upp, tí fleiri fundir eru hildnir. Í 2008 vóru sáttmálasamráðingar, og hetta merkti sjálvsagt, at nevndin hevði økt fundarvirksemi og samráddist nógv í november/desember. Eitt úrslitið av hesum var sjálvsagt, at meir fundarpeningur var útgoldin.

**Samsýningar í FF**

Viðvíkjandi samsýning, so fær formaðurin í FF fasta mánaðarløn og nevndarlimirnir fáa eina lítla mánaðarliga samsýning, fundarpening umframt ferðaendurgjald. Tá ið samráðingar hava verið, eru onkrir bidnir um at vera heima ein túr, og hevur fiskimannafelagið so endurrindað kostnaðin fyri túrin – hetta er hent undir samráðingum fyri einstakar nevndarlimir.

Umframt at vit hava havt sáttmálasamráðingar, so hevur nógv eyka fundarvirksemi verið orsaka av, at vit hava arbeitt við at gera eitt nýtt hús, sum skuldi verið fullkomiliga liðugt í februar mánaði, vit hava skift tryggingar, vit hava arbeitt virkið við at fáa gjørt eina eftirlønarskipan umframt at fleiri mál eru tikin upp.

Um nevndarlimir halda, at samsýningarnar eru ov stórar, ella at teir fáa ov nógv, so kunna teir leggja uppskot fram um at minkað ella strikað fundarpeningin ella ta føstu mánaðarsamsýningina. Til ber eisini at fara yvir í eina tímaskipan, soleiðis at peningur fæst fyri hvønn fundartíma.

Teir sum nú beint eftir landsfundin fýltust á, at teir fáa ov nógv í nevndarsamsýning hava higartil ikki gjørt nakað arbeiði innanhýsis fyri at minkað samsýningarnar – tvørturímóti!

**Føra fleiri sakir**

At nevndarlimir hava ilt av, at sakførarakostnaðurin er øktur, er mær óskiljandi.

Í grundini áttu nevndarlimir at fegnast, tí;

- vit taka fleiri mál upp,
- vit tryggja okkum, at tað vit gera løgfrøðisliga er forsvarligt
- vit føra fleiri sakir vegna limirnar.

Tað kann vera, at næstformaðurin heldur, at tað er í lagi, at ein reiðari av sínum eintingum broytir sáttmálan og gevur yvirmonnunum meir og tekur meir í sín part, men gevur minnið til okkara limir, men tað haldi eg, og ein meiriluti í nevndini ikki, og tí gjørdist hetta málið stórt, eins og onnur líknandi mál eru tikin upp.

Tá ið sáttmálin verður brotin, so hava vit sum felag skyldu at føra sakir fyri limir okkara. Ongin reiðari verður drigin í rættin uttan fyrst at hava fingið møguleika at rættað feilir sínar, men vit mugu ikki lata reiðarar sleppa, sum tilvitað bróta sáttmálan.

Vit mugu føra sakir í slíkum førum, og tað hava vit gjørt, og tað skulu vit halda á við at gera.

**Endamálið við FF**

Vit mugu spyrja okkum sjálvi, hvat er endamálið við fiskimannafelagnum?

Í mínum hugaheimi er fremsta endamál at virka fyri limirnar, og um tað so merkir, at rokningin til sakførara gerst størri og yvirskotið minnið, so má tað vera so.

Tað kann heldur ikki vera meiningin, at vit taka nógvan pening frá limum at seta til síðis. Tað má ikki vera ein spurningur um vit hava ráð at hjálpa einum limi, tá ið hann hevur tørv á tí.

Vit skulu fyrst og fremst tæna limunum, og tað gera vit við at vera eitt virkið og livandi felag, sum gevur fleiri limafyrimunir og sum verjir limin, um hann er fyri órætti. Hetta hevur verið og er mítt fremsta áhugamál sum formaður í Føroya Fiskimannafelag.